Partners

DIIS
DANISH INSTITUTE FOR INTERNATIONAL STUDIES

UNIVERSITY OF ALBERTA

LULEÅ TEKNISKA UNIVERSITET

UNIVERSITY OF TURKU

Háskólasetur Vestfjarða
University Centre of the Westfjords

SDU Climate Cluster

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

INDIANA UNIVERSITY

UNIVERSITAS BERGENSIS
UNIVERSITY OF BERGEN

OCEANS NORTH
KALAALLIT NUNAAT

University of Colorado Boulder

NordForsk

This project has received funding from the NordForsk Sustainable Development of the Arctic Programme. Grant Agreement No. 213038.

New Frontiers in Research Fund
Fonds Nouvelles frontières en recherche

We acknowledge the support of the Government of Canada's New Frontiers in Research Fund (NFRF), [NFRFJ-2024-00014].



LostToClimate

Addressing Unavoidable Non-Economic Losses to Climate-Induced Events for Communities in the Arctic

LostToClimate Research Project

Arktis hitnar skjótari enn miðalhitin á jørðini orsakað av veðurlagsbroytingum. Hetta er ein stór avbjóðing fyri fólk og samfeløg í Arktis, og broytingarnar ávirka vælferðina bæði fíggjarliga (t.d. tá talan er um oyðilagt undirstøðukervi) og ikki-fíggjarliga (t.d. við at ávirka mentanararv og heilsu).

Í teimum flestu londunum hevur tann ikki-fíggjarligi missurin og skaðin ikki eins høga politiska raðfesting sum tann fíggjarligi missurin og skaðin. Hetta er óheppið, tí veðurlagsbroytingar ávirka í stóran mun mentanararv, siðvenjur, vistfrøði, heilsu og annað, sum ikki eins væl kann ella skal gerast upp í peningaligum virði.



Partner locations. *Map compiled by Winfried K. Dallmann. Published with permission from the Norwegian Polar Institute*

- **"Fólk, sum búgva á útoyggj, hava ofta sterkt tilknýti til staðið, men kenna seg ikki altíð tikin upp á ráð í politiskum avgerðum, sum viðvíkja teimum."**
- - Útoyggjaálitið 2025, s. 3.

Føroyska kanningin

Verkætlanin LostToClimate kannar, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka ikki-fíggjarligan miss. Í føroyska partinum av kanningini kanna vit vitan og siðvenjur á útoyggj, sum hava við fuglaveiðu at gera. Fleiri fuglastovnar eru í minking, og hetta hevur stóra ávirkan á eina siðvenju, sum hevur havt týdning fyri føroyingar í øldir.

Minkandi sjófuglastovnar, eitt nú lundastovnurin, hevur við sær eitt økt trýst á hesar siðvenjur. Á summum plássum er lundaveiða bannað, meðan onnur pláss loyva avmarkaðari veiðu við árstíðarbundnum avmarkingum. Tillagingarátøk eru sostatt longu sett í verk, men tey eru ymisk frá plássi til pláss, og ymisk sjónarmið eru um, hvat eigur at verða gjørt framyvir.

Samstarv tvørtur um Arktis

Verkætlanin er umboða við granskarum úr Finnlandi, Svøríki, Noregi, Føroyum, Íslandi, Grønlandi, Kanada og USA, eisini eru upprunafólk umboðaði. Verkætlanin nýtir ymisk sløg av etnografiskum háttaløgum. Úr Føroyum luttaka granskarar frá Søgu- og samfelagdeildini á Fróðskaparsetrinum.

Verkætlanin spyr og svarar fýra høvuðsspurningum:

- Hvørji sløg av ikki-fíggjarligum missi og skaða kunnu væntast?
- Hvørjar býtishandlar ("trade-offs") eru lokalsamfeløg sinnað at góðtaka?
- Hvørji prógv eru fyri, at rættvísar loysnir verða valdar?
- Hvørjar loysnir ynskja lokalsamfeløg í Arktis í sambandi við ikki-fíggjarligan miss og skaða?

Samband

Ragnheiður Bogadóttir og
Tráin Petursson Nónklett
Fróðskaparsetur Føroya
Teldupostur: ragnheidurb@setur.fo /
trainpn@setur.fo

www.losttoclimate.org

www.linkedin.com/company/losttoclimate-research-project

@losttoclimate.bsky.social